## Karadzic møtti ikki



Radovan Karadzic møtti ikki í morgun, tá krígsbrotsmannadómstólurin í Haag fór undir at viðgera ákærurnar ímóti honum. Tann 64 ára gamli Karadzic hevur fyrr boðað frá, at hann vil ikki hava nakran sakførara at verja seg. Tað ætlar hann at gera sjálvur, men nú sigur hann, at hann hevur ikki fingið stundir til at fyrireika verjuna. Hann hevur fyrr biðið um at fáa málið útsett 10 mánaðir, men tað bleiv sýtt honum. Radovan Karadzic er ákærdur fyri krígsbrotsverk í krígnum í Bosnia, og ákærin sigur, at tað ber væl til at avhoyra fleiri vitni, sjálvt um tann ákærdi ikki møtir í rættinum.

## Vend í Russlandi

Altjóða fíggjarkreppan rakti Russland eins og øll onnur lond, men sambært russiska fíggjarmálaráðharranum er afturgongdin har steðgað nú. Við russisku tíðindastovuna Interfax sigur Alexei Kudrin, at vend er komin í búskapin, og at eftir metingum hjá stjórnini fer Russland at hava tvey prosent vøkstur í búskapinum í fjórða ársfjórðingi. Russiski fíggjarmálaráðharrin ásannar, at oljuprísurin hevur stóra ávirkan á russiska búskapin, og so leingi prísurin liggur um 70 ella 80 dollarar, fer búskaparvøksturin at standa við í Russlandi.

# sunarherinum



*Snórurin varð ikki kliptur, men skorin av við enum grindaknívi*




*Eingin føðingardagur uttan eina føðingardagslagkøku*



*Hugnaligu hølini hava gott útsýni yvir Havnina og Nólsoyarfjørð*



*Jógvan Arge, formaður í Mentamálanevndini hjá Tórshavnar býráð, helt røðu*




*Nýggja Herbergið hevur fingið ein tilbygning*



*85 ára hátíðarhaldið fór fyri ein part fram í auluni í Eysturskúlanum*